# Blunda og krógva

Stutt vegleiðing um, hvussu spælt verður.

**Stuttligt spæl, har øll kunna vera við. Er vælegnað, bæði sum inni- og útispæl.**

Ein luttakari blundar, meðan hini krógva seg. Tá ið tann, sum blundar, hevur talt, t.d. upp í 50 ella 100, so rópar hann hart "komið". Hann skal so leita eftir hinum, sum hava krógva seg. Tá tann sum blundaði fær eyga á ein av teimum krógvaðu, rópar hann navnið á viðkomandi, sum so er funnin og fangað/ur.

Spælið heldur áfram, til hann hevur funnið allar luttakarnar. Tann sum seinast verður funnin, eigur síðani at blunda.

Áðrenn spælið byrjar, kann avtalast, hvussu víða um, loyvt er at krógva seg.



GIGNI
Heilsufrøði til børn & ung

Niels Finsensgøta 37 · Postboks 132 · 110 Tórshavn · Tlf:562 300 · www.gigni.fo